# Ársins fyrsti føroyingur av Sandi

**Ikki meiri enn 55 minuttir vóru farnir av nýggja árinum, tá Dagunn Clementsen av Sandi átti ársins fyrsta barn á Landssjúkrahúsinum í Havn. Dótturin er somuleiðis fyrsta barnið hjá henni og manninum, Eyðfinn**



*Dagunn og Eyðfinn Clementsen av Sandi hava fingið ársins fyrsta føroying. Klokkan 00.55 nýggjársnátt átti Dagunn eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3750 gram.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

ÁRSINS FYRSTA BARN

*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Lítla diddan hevur, hóast hon er nýfødd, longu víst, at hon hevur egnan vilja. Tí hóast læknarnir mettu, at hon skuldi verða fødd 21. desember, so var hon av aðrari áskoðan, og lat øll bíða í spenningi heilar 10 dagar útyvir ásettu tíðina.

### Keisaraskurð

Dagunn greiðir frá, at hon var sett at eiga 21. desember, men tað dróg út, og vatnið fór ikki fyrr enn seinnapartin 31. desember. Heili 10 dagar eftir ásettu tíðina.

– Men sjálvt um vatnið varð farið, so gekk tað ongan veg allíkavæl, og diddan lat framvegis bíða eftir sær. Beint eftir miðnátt nýggjársaftan avgjørdu tey tí at geva mær keisaraskurð, sigur Dagunn.

Keisaraskurðurin gekk væl, og klokkan 00.55 fingu Dagunn og Eyðfinn eina dóttur.

Hon var 52 cm long og vigaði 3750 gram.

### Í Havn síðani 10. desember

Tað hevur verið drúgv bíðitíð hjá Dagunn í Havn. Læknin á Sandi sendir nevniliga allar barnakonur til Havnar 10 dagar áðrenn tær eru settar at eiga, í so fall, at barnið skuldi komið fyrr enn væntað, ella um onkur vandi skuldi stungið seg upp.

– Eg var sett at eiga 21. desember, so læknin sendi meg til Havnar longu 10 desember. Eg havi bæði hildið jól og nýggjár her í Havn. Men sjálvt um eg havi verið her leingi, so hevur tað verið fínasta slag, tí eg havi tvær systrar her, so eg havi ikki verið einsamøll, greiðir Dagunn frá.

Spurd um hon leggur nakað serligt í tað, at hava átt ársins fyrsta barn, svarar Dagunn, at tað ger hon.

– Tað er eitt sindur serligt at hava ársins fyrsta barn, tað haldi eg, svarar hon.

Hvørki á Suðuroyar- ella á Klaksvískar Sjúkrahúsið er nakað barn komið í verðina higartil í 2005.

## Ferðsluóhapp á Oyggjarvegnum

Náttina til fríggjadagin hendi eitt álvarsamt ferðsluóhapp á oyggjavegnum, norðanfyri Kleynisvarða.

Ein kvinna, sum einsamøll koyrdi í bili sínum, fór út av vegnum og fekk álvarsligan løst.

Vakthavandi sigur seg ikki vita smálutirnar í hendingini, men kvinnan er álvarsliga skadd, og hon hevur ligið á landssjúkrahúsinum síðani.

## Bardagi á Hálsi

Beint eftir miðnátt, náttina til nýggjársaftan, varð løgreglan biðin um at koma niðan í ítróttarhøllina á Hálsi, har tveir mans vóru farnir til hendurs. Klokkan 01.30 varð ringt oman á støðina, og løgreglan var skjót á staðið. Vakthavandi veit tó at siga, at tað ikki var so álvarsamt, og at tað lagaði seg so skjótt løgreglan kom á staðið.

## Bardagi á Platform

Klokkan 03.00 nýggjársaftansnátt vóru boð send eftir politinum í sambandi við ein bardaga í dansistaðnum Platform. Løgreglan fór oman á Platform, har ógvusligur bardagi var ímillum tveir mans. Vakthavandi sigur, at harðskaps sak verður burturúr málinum.

## Bardagi í Eysturbýnum

Um fimm tíðina nýggjársaftansmorgun, vóru aftur boð eftir politinum, at koma ímillum ein bardaga. Hesuferð var tað uttanfyri eini privathús í Eysturbýnum, men so skjótt, sum løgreglan kom á staðið, lagaði tað seg, og meiri varð ikki gjørt við málið.

## Eldur í bili

Um 21 tíðina nýggjársaftan, fekk løgreglan eina fráboðan um, at eldur var í einum bili í Kvívík. Orsøkin til eldin er ókend, og bilurin er tí tikin inn á Bileftirlitið, har bilurin í løtuni verður kannaður. Ilt er at siga, um talan var um fýrverk, ella um eldurin varð ásettur. Eingin var í bilinum, tá eldur kom í hann. Hann stóð parkeraður uttanfyri eini hús.

## Sløkkiliðið 2 ferðir boðsent nýggjársaftan

Vakthavandi sigur, at eldur varð fráboðaður ikki færri enn tvær ferðir nýggjársaftan.

Fyrru ferð í Vestmanna kl 21.15, tá fólk, ið vóru stødd niðri við sjóvarmálan, hildu seg síggja eld í vindeygunum í einum húsum longri uppi. Sløkkiliðið varð boðsent alt fyri eitt, men tíbetur var tað, tá avtornaði, ikki so álvarsamt hóast alt.

Eitt bál var nevniliga kynt nakað frá húsunum, og flammurnar av bálinum spegladust í rútunum á húsunum. Tey, sum boðaðu eldin, sóu ikki sjálvt bálið, bert speglingina av tí í vindeygunum, og tí ivaðust tey ikki í, at eldur var komin í,

Júst tað sama hendi á Argjum kl. 21.30, tá sløkkiliðið eisini varð boðsent, eftir at eitt bál spegladist í vindeygunum í einum húsum.

Í báðum førum kom sløkkiliðið á staðið og staðfesti, at talan var um falskan alarm.


## Móttøka

Í samband við stjóraskifti nú Mikkjal Sørensen leggur frá sær og Søren Lünell Bruhn tekur við, verður boðið til almenna móttøku í Fyrisitingarbygningi Sparikassans í Vági fríggjadagin 7. januar 2005, kl. 14.00 - 17.00.



Mikkjal Sørensen



Søren Lünell Bruhn

SUÐUROYAR SPARIKASSI

REPROZ